# a B

## Í sama flokki

Sum longu nevnt eru bert átta skúlanæmingar í Funningsfjarðar skúla.
Av hesum átta næmingunum eru teir seks úr Funningsfirði, meðan tveir teirra koma úr grannabygdini Elduvík.
Skipanin er tann, at allir næmingarnir eru í einu og somu stovu, men verða so býttir upp við ávís høvi.
Onkrar dagar kemur onkur teirra fyrri í skúla, og onkrar dagar kemur onkur annar seinni í skúla. Men onkutíð hava teir eisini felags tímar.
Tá teir hava gingið sjey ár í hesum skúlanum verður farið í framhaldsdeild í Runavík.

rúgva av litblýtantum, sigur Brandur.

Men taskan inniheldur eisini annað enn tað. Ein lítil lummi er frammanfyri, og í hesum lummanum liggur ein mateskja, sum enn er innballað í plastikkið frá framleiðaranum.

Á høgru síðu er enn ein lummi, har hann kann hava tímatalvuna í. Og mín sann um ikki ein lummi er á vinstru síðu eisini.

Í hesum lummanum er ein fløska, har saft kann latast í, so at Brandur kann sløkkja sær tostan í skúlanum, um tað skuldi gjørst neyðugt.

### Navn og tøl

Hóast Brandur nú byrjar í 1. flokki, so hevur hann kortini gjørt nakrar royndir at "snúsa" eitt sindur til skúlalívið.

Hann hevur lært seg at skriva nakrar av bókstavunum í føroysku stavrøðini.

- Eg dugi at skriva B. Og eg dugi at skriva R og A. Ja, eg dugi eisini at skriva navnið hjá mær, sigur hann – B-R-A-N-D-U-R.

Hann hevur eisini lært seg at skriva nøkur av tølunum.

- Heilt upp í 20, sigur hann.

Júst tað, heldur eldri beiggin ikki vera so nógv at reypa um, tí nú brýtur hann hin yngra av.

- Men eg. Eg dugi at skriva upp í 100!, sigur Tórður.

Spurdur um hann dugir at rokna nakað, svarar hann eitt spakuligt ja.

Hann veit, at um hann hevur eitt bomm og fær eitt bomm aftrat, so hevur hann tvey bomm. Og um hann fangar tvær tarabrosmur og beiggi hansara eina, ja, so hava teir tríggjar tarabrosmur.

### Er lærarin fittur?

Brandur er í teirri hepnu støðuni, at hann eigur ein eldri beiggja – Tórður – sum longu hevur gingið tvey ár í skúlanum í Funningsfirði.

Og Tórður hevur roynt at svara honum uppá allar spurningarnar um skúlan, m.a. um hvat tey gera í tímunum.



*Skúlataskan er klár. Skrivibøkur og penalarhús er klárt, og í einum lumma liggur mateskja, saftdunkur og eitt pláss til tímatalvuna*



*Brandur hevur longu lært seg at skriva upp í 20. Men tað heldur eldri bróðurin ikki vera nógv at reypa av, tí hann dugir at skriva upp í 100*

- Ja, Brandur hann hevur spurt meg um, hvussu ofta man svimur, svarar Tórður nú til.

Hann veit, at beiggjanum dámar sera væl at svimja. Júst hetta er eitt av tí, sum tey gera nógv av í skúlanum, tí tey svimja regluliga í skúlanum á Strondum.

Í so máta er Brandur rættiliga heppin. Men hann hevur eisini sett aðrar spurningar til beiggjan.

- Hann hevur eisini spurt meg nógv um lærararan: Um hann er fittur og um hann er strangur, sigur Tórður.

### Skúlating

Út frá øllum svarunum frá beiggjanum, og út frá tí sum onnur hava greitt honum frá, hevur Brandur fingið eina lítla hóming av, hvat tað til siga at ganga í skúla og hvat ein ger har.

- Í skúlanum ger man nógv við lesing. Man roknar og hevur fimleik – og svimur.

- Og so hevur man eisini ofta fríkorter. Eg veit eisini, at lærarin sigur við børnini, at tey skulu út í fríkorter, sigur Brandur.

Er tað kortini nakað, sum øllum næmingum ikki plaga at dáma, so er tað heimaarbeiðið. Hvat sigur Brandur til tað?

- Eg veit ikki, er stutta svar hansara til henda spurningin.

## Í fjøru og stovu

Men tað er jú eisini ein dagur og ein verð uttan fyri skúlan ella dagrøktina, sum Brandur higartil hevur gingið í.

Í eini bygd, sum liggur oman móti sjónum og nær við ein djóraríkan Funningsfjørð, so er fjøran eitt heilt natúrligt spælistað hjá Brandi, Tórði og øðrum dreingjum í bygdini.

Teir plaga tí ofta at vera niðri í fjøruni og fanga ymiskt, sum er har.

- Her er nógvur krabbi. Og vit fanga eisini ofta tarabrosmur og marflugur.

- Tað er ordiliga skeg, sigur Brandur.

Hann, Tórður og mamman plaga eisini at vera á Bakkabryggjuni fyri at fiska. Tey eiga eina kettu – Gamli-Mjauv av navni, sum dámar væl at fáa feskan føroyskan fisk úr Funningsfirði.

Tað er ikki altíð at teir tíma at fiska ella spæla í fjøruni, og tá plaga teir at fara inn at spæla. Tá spæla teir m.a. Playstation og at hyggja eftir teknifilmi.

- Tað er eisini ordiliga skeg, sigur Brandur.

# Eingin skúli enn á sinni



**Eins og aðrastaðni kring landið so verður farið í skúlarnar aftur komandi mánadag – men ikki í Kollafirði**

SKÚLI
*Snorri Brend*
*Mynd: Bárður*

**Kollafjørður:** Í Kollafirði hevur skúlin verið undir eini umbygging og eini útbygging í eina tíð.

Ætlanin var upprunaliga, at næmingarnir skuldu sleppa í henda skúlan nú mánadagin, tá skúlaárið 2005/2006 byrjar.

Men arbeiðið er ikki liðugt enn, og verður heldur ikki liðugt til mánadagin. Spurningurin er so bara, nær tað verður.

Tað veit skúlastjórin, Karin Hammer ikki. Men hon sigur tó, at børnini fara í øllum førum í skúla í Kollafirði, men ikki í Kollfjarðar skúla.

- Vit hava nøkur egnað høli runt her í bygdini, og verða tey so brúkt sum skúlastovur, inntil umbyggingin av skúlanum verður liðug, sigur Karin við Sosialin.

Í løtuni eru teir í ferð við umbyggingina. Tað er serliga hesin parturin, miðskeiðis í skúlabygn-ingin-um, sum hevur ført við sær, at tað ikki er gjørligt at hava skúlagongd í løtuni.

*Arbeiðið við umbyggingini av Kollfjarðar skúla er ikki liðug enn. Tí mugu børnini fara í onnur hølir í eina tíð*